

# *Sosialráðgevi* til Eysturoyar barnaverndartænastu

Eitt farloyvisstarv sum sosialráðgevi í Eysturoyar barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan frá 01.12.2007 til 01.10.2008, við møguleika fyri longdari starvstíð.

### Um Eysturoyar barnaverndartænastu

Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes, Sjóvar, Runavíkar, Gøtu og Funnings kommunu. Í samstarvsøkinum eru 7.061 íbúgvar harav 2.077 eru undir 18 ár. Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Umsitingarliga er Eysturoyar Barnaverndartænasta ein eind undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

### Starvið

Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum, sum Barnaverndarumsitingin tekur sær av.

### Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:

- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaverndarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

### Vit leita eftir starvsfelaga, ið:

- er útbúgvin sosialráðgevi ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg
- hevur telduførleika á brúkarastøði

### Vit bjóða tær

Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum og við góðum møguleika fyri førleikamenning.

### Setanarviðurskifti

Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi fakfelag.

### Fleiri upplýsingar

Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara ella Jenny Petersen, sosialráðgeva á Telefon 417000.

### Søk starvið

Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi 29.10.2007 kl. 12:00

### Umsóknin skal sendast til:

Runavíkar kommunu
Att. Eysturoyar barnaverndartænasta
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-610 Saltangará

Runavíkar kommuna

Heiðavegur 26 · 600 Saltangará · Tel 417000 · Faks 417001
runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

